# Sandvíkar Kirkja 100 ár

## HÁTÍÐARHALD

Í sambandi við, at Sandvíkar Kirkja fylti 100 ár 18.oktober, verður hátíðarhald í bygdini sunnudagin 26. oktober.

Hátíðarhaldið byrjar við gudstænastu klokkan 12.00 við luttøku av Jógvani Fríðrikssyni, bispi, Símuni Jacobsen, sóknarpresti og Jónsveini Bech presti á Tvøroyri.

Eftir gudstænastuna verður døgverði fyri innbodnum, men frá klokkan 17.00 er opið hús fyri øllum áhugaðum í bygdarhúsinum Ranhøll í Sandvík, har ein drekkamunnur verður at fáa.

Kirkjan í Sandvík hevur eina heilt serliga søgu.

Upprunaliga varð hon bygd í 1840 úti í Bø í Froðba, men í 1856 varð hon flutt inn á Tvøroyri.

Tvøroyri vaks skjótt og um aldarskiftið farna var hon ov lítil, og tá fóru serliga Mortensensmenninir at tosa um at byggja nýggja kirkju á Tvøroyri.

Sandvík, sum vit kenna hana í dag, æt Hvalvík um hetta mundið. Har var ongin kirkja, so tá ið bygdarfólkið skuldi í kirkju, máttu tey til gongu upp um fjallið í kirkju í Hvalba.

Í bókini um føroysku kirkjurnar eftir J. P. Gregoriussen stendur at lesa, at nú tvørafólk skuldu hava nýggja kirkju, sóu hvalvíkingar sær ein møguleika at keypa kirkjuna á Tvøroyri og sostatt fáa kirkju í Sandvík, og 23. januar 1907 skrivaðu teir til Færø Amt og provst við hesum ynski.

Færø Amt og provstur eru skjótir at senda sakina víðari til kirkjuráðið í Hvalba, sum við Fr. Busch, presti, sum formanni, góvu umsóknini sítt besta viðmæli.

Ætlanin verður játtað, og teir skila eisini til, hvussu stór kirkjan skal vera eftir umbygginga í Hvalvík: Kirken skal have en Størrelse af mindst 23 x 11 Alen, skal opføres af Træ med Yderbeklædning og Tag af Bølgeblik.

Nýggja kirkjan á Tvøroyri varð tikin í brúk Kristi Himmalferðardag í 1908, og eftir tað kundu hvalvíkingar fara rættiliga til verka. Niels Persson, bygningssnikkari, á Tvøroyri, sum hevði gjørt tekningina til kirkjuna í Hvalvík, stóð fyri arbeiðinum.



Tað gekk skjótt at smíða, tí longu 30. august 1908 hava Niclas Holm og Daniel Vest, timburmeistarar úr Hvalba, sýnað kirkjuna.

Kirkjan varð vígd 18. sunnudag eftir Trinitatis í 1908. Hetta var aðru ferð hettar árið at kirkjuvíglsa var í prestagjaldinum, so tað man hava verið tinginum ovboðið at fara avstað aftur. Busch prestur skrivaði: Kirkeindvielsen i Hvalvig blev vistnok ikke saa stor en Festlighed som den i Tveraa Kr. Himmelfartsdag i Aar. Der var saaledes ingen andre Præster til stede unden Provsten, der foretog Indvielsen, og Sognepræsten, der assisterede ved indvielsen og prædikede over Dagens Tekst.

Seinni skifti bygdin so navn til Sandvík og í ár eru sum nevnt 100 ár liðin, síðan kirkjan varð tikin í nýtslu.

## VEÐRIÐ



Petur Skeel Jacobsen greiður frá um veðrið




**Veðrið í kvøld**
Útnyrðingur, 8 m/s. Skýggjað, men turt. Hitin 4 stig.




**Veðrið mikudagin**
Skiftandi millum útnyrðing og útsynning, 8 m/s. Fyrrapartin og seinnapartin turt, men út á kvøldi fer at regna. Hitin millum 6 og 8 stig.




**Veðrið hósdagin**
Útsynningur 8 til 11 m/s. Regn allan dagin, mest um kvøldið. Hitin millum 6 og 10 stig.

**Veðrið fríggjadagin**
Útsynningur, 12 m/s. Regn. Hitin 6 stig

**Veðrið Formuladagin mikla – leygardagin**
Landnyrðingur 11 m/s. Sól fyrrapartin, yvirskýggjað, men turt seinnapartin. Hitin um 3 stig og turt. Út á kvøldið fer aftur at regna

**Hitalagið kring knøttin**

| | |
|---|---|
| Illulisat | -3 |
| Nuuk | -- |
| Qaqortoq | 3 |
| Ammassalik | -3 |
| Saint John's | -- |
| Halifax | -- |
| Reykjavík | 4 |
| Seyðisfjørður | 3 |
| Tórshavn | 6 |
| Lerwick | 9 |
| Aberdeen | 12 |
| London | 13 |
| Tromsø | -- |
| Bergen | 10 |
| Oslo | -- |
| Stokkhólm | 7 |
| Keypmannah. | 11 |
| Helsinki | 8 |
| Moskva | 6 |
| Berlin | 11 |
| Warzawa | 8 |
| Kiev | 11 |
| Bukarest | 14 |
| Paris | 15 |
| Madrid | 17 |
| Róm | 22 |
| Malorca | 23 |
| Athen | 22 |
| Malta | 25 |
| Tunis | 25 |
| Beijing | 24 |
| New Dehli | 29 |
| Bangkok | 29 |
| Jakarta | 32 |
| Sydney | -- |
| New York | 13 |
| Miami | 28 |
| Los Angeles | 20 |
| Meksikobýur | -- |
| Panama | -- |
| La Paz | 13 |
| Rio de Janeiro | -- |
| Buenos Aires | 23 |

## LUFTTRÝSTIÐ



**Veðurvánirnar**
Eitt lágtrýst 965 hPa yvir Norskahavinum ferðast í ein landnyrðing.



Kalt luftrák streymar eitt skifti inn yvir Føroyar

## HITALAGIÐ




Hitalagið mált frá 18/10 kl. 06[00] – 19/10 06[00]. Hitin í gjár: 9,8°
Minsti hiti máldur í oktober: -4,0° - Mesti hiti máldur í oktober: 18,4°

## AVFALLIÐ




Avfallið: 15,0 mm – mált frá 18/10 kl. 06[00] – 19/10 06[00].
Avfallið higartil í oktober: 160 mm







## VESTFALLSKYRRINDI

17. oktober Mánin næstur jørðini
21. oktober Seinna kvarter

Kelda. Álmanakkin 2008

| | Suðuroyar-/ Vágafirði | | Skúvoyar-/ Skopunarfirði | | Hestfirði/ Sundalagnum | | Vestmanna-sundi | | Mykines-firði | | Nólsoyar-firði | | 2 fj. í LS úr Mjóvanesi | | Leirvíksfirði/ Haraldssundi | | Kalsoyar-/ Svínoyarfirði | | Hvanna-sundi | | Fugloyar-firði | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| Dagur | fp. | sp. | fp. | sp. | fp. | sp. | fp. | sp. | fp. | sp. | fp. | sp. | fp. | sp. | fp. | sp. | fp. | sp. | fp. | sp. | fp. | sp. |
| 21. okt | 1:00 | 13:25 | 0:00 | 12:25 | 0:15 | 12:40 | 3:00 | 15:25 | 4:00 | 16:25 | 11:40 | - | 10:40 | 23:35 | 1:15 | 13:40 | 2:15 | 14:40 | 0:45 | 13:10 | 2:00 | 14:25 |
| 22. okt | 2:20 | 14:45 | 1:20 | 13:45 | 1:35 | 14:00 | 4:20 | 16:45 | 5:20 | 17:45 | 0:35 | 13:00 | - | 12:00 | 2:35 | 15:00 | 3:35 | 16:00 | 2:05 | 14:30 | 3:20 | 15:45 |
| 23. okt | 3:03 | 15:27 | 2:03 | 14:27 | 2:18 | 14:42 | 5:03 | 17:27 | 6:03 | 18:27 | 1:18 | 13:42 | 0:18 | 12:42 | 3:18 | 15:42 | 4:18 | 16:42 | 2:48 | 15:12 | 4:03 | 16:27 |
| 24. okt | 3:49 | 16:11 | 2:49 | 15:11 | 3:04 | 15:26 | 5:49 | 18:11 | 6:49 | 19:11 | 2:04 | 14:26 | 1:04 | 13:26 | 4:04 | 16:26 | 5:04 | 17:26 | 3:34 | 15:56 | 4:49 | 17:11 |
| 25. okt | 4:31 | 16:52 | 3:31 | 15:52 | 3:46 | 16:07 | 6:31 | 18:52 | 7:31 | 19:52 | 2:46 | 15:07 | 1:46 | 14:07 | 4:46 | 17:07 | 5:46 | 18:07 | 4:16 | 16:37 | 5:31 | 17:52 |